## VIÐMERKINGAR

# Skilaleys samanlegging av skúlum

FELAGIÐ MASKIN-
MEISTARALÆRARAR
23. februar 2006

**Opið bræv til Jógvan á Lakjuni, landsstýrismann í mentamálum.**

Seinastu tíðina hevur nógv verið frammi í fjølmiðlunum um skipan av skúladeplum og samanlegging av skúlum. Bæði í fimmaranum í Útvarpinum 1. februar og í kjakinum í SvF 21. februar var evnið skúladeplar og útbúgvingar.

Í apríl 2004 vórðu starvsfólkini á Maskinmeistaraskúlanum kunnað um ætlan Mentamálaráðsins at leggja Maskinmeistaraskúlan og Føroya Sjómansskúla saman í ein stovn. Í kunningarskrivi til lærararnar verður m.a. sagt, at Mentamálaráðið skal saman við leiðslunum á skúlunum tryggja, at starvsfólkapolitikkurin hjá Løgmansskrivstovuni verður fylgdur, og at tað er av stórum týdningi, at starvsfólkini á skúlunum verða kunnað/hoyrd soleiðis, at tey kunnu taka undir við bygnaðarbroytingunum.

Tann 1. sept. 2004 tók nýggjur stjóri við á Maskinmeistaraskúlanum og ein mánað seinni tók sami persónur við sum stjóri á Føroya Sjómansskúla eisini. Stjórin hevur ongar námsfrøðiligar royndir. Mikið rok var í Løgtinginum og í fjølmiðlunum um setanina, tí summi vilja vera við, at stjórin er politiskt settur. Sjálvandi er hann ikki tað.

Um miðjan juni 2005, eina viku áðrenn skúlin fór í summarfrí, komu boð í teldubrævi frá stjóranum um, at nú skuldi øll undirvísingin flytast oman í Nóatún og troðkast inn í ein bygning, sum er alt ov lítil. Boðini eru greið: Avgerðin er nú tikin! Lærararnir fáa boð um at pakka teirra “arbeiðsbøkur og annað” niður í flytikassar og seta navn á.

Starvsstovur, maskinrúm, køliútbúnaður, teldustova og dieselsimulator skuldu framvegis vera undir Kráku-gjógv. Flestu starvsstovurnar verða nógv brúktar í dagligu undirvísingini. Nú skulu uml. 3 km verða millum undirvísingarhøli og starvsstovur.

Úrslitið av hesi skilaleysu og óumhugsaðu avgerð var ikki óvæntað. Tá skúlin byrjaði aftur eftir summarfrítíðina er lítið skil á. Nøkur dømi:

Sera trongligt er hjá næmingunum í mun til tað, teir eru vanir við undir Krákugjógv;
alt ov fá parkeringspláss;
vánalig inniluft, vánaligt ljós, alt ov fáar talvur;
ongin lyfta er í bygninginum, sum hevur tríggjar hæddir;
ein ússalig teldustova við 9 teldum til 160 næmingar;
næmingarnir kundu ikki seta egnar teldur til lokalnetið, onki internetsamband var;
ongin skipaður flutningur millum bygningarnar, tosað verður um at keypa buss ella leiga taxabilar at ferðast við.

Í dag er framvegis ilt at fáa eyga á fyrimunirnar við flytingini, tí:

Nógvur peningur er brúktur til at geva næmingunum verri umstøður, enn teir høvdu frammanundan.

Lítil og ongin samlestur er í grundlærugreinunum, tí flokkarnir eru so stórir; tí er ongin sparing.

Skúlin við allari tøkniligu útgerðini undir Krákugjógv tykist ongan góðan at hava og fer í órøkt.

Øll menning á tøkniliga økinum er steðgað upp.

Tað er stórt afturstig námsfrøðiliga, at tað nú ikki ber til at skifta lættliga millum ástøðiliga undirvísing og praktiskt arbeiði sum áður. Slíkt skifti ger arbeiðið hugaligari hjá bæði næmingum og lærarum, og frálæran verður munandi betri.

Nógv tíð fer til spillis at ferðast í.

Henda avgerð myndugleikanna hevur víst seg at vera eitt stórt afturstig fyri maskinmeistaraútbúgvingina. Hevði ein nýggjur skúladepil verið bygdur til at hýsa øllum virkseminum hjá báðum skúlunum, hevði støðan verið ein onnur. Tað, sum her er gjørt, er, at ein hálvur Maskinmeistaraskúli er lagdur saman við Sjómansskúlan. Ein og hvør við kunnleika og royndum á undirvísingarøkinum dugir at síggja, at her er tað ikki skilið, ið ræður. Maskinmeistaraskúlin er við hesi avgerð settur eini 10-15 ár aftur í tíðina.

Tað sum er hent við maskinmeistaraútbúgvingini er eitt ræðandi dømi um, hvussu vánalig fyrireiking og vantandi virðing fyri serkunnleikanum roynist í verki. Hóast føgur orð um kunning, opinleika og ávirkan, so er veruleikin ein annar.

Tí hava lærarar í miðnámsskúlunum alla grund til at vera á vakt, so teir ikki verða tiknir á bóli eins og vit vórðu.

Kann landsstýrismaðurin gera so væl alment at svara okkum uppá hesar spurningar:

*Komu harraboðini um flytingina úr Mentamálaráðnum?*
*Hvønn ráðførdi Mentamálaráðið/skúlaleiðslan seg við í sambandi við flytingina?*
*Hevur nakar arbeiðsbólkur viðgjørt málið um flytingina og møguligar bygnaðarbroytingar?*
*Hví vórðu lærararnir ikki kunnaðir og tiknir við í ráðum?*

Vit taka fult undir við samstarvi við aðrar skúlar, um alt fer fram í opinleika og við skili.

Sigast skal, at vit kenna okkum væl millum lærararnar á Sjómansskúlanum, hóast umstøðurnar hjá teimum og teirra næmingum eisini eru vorðnar verri.

Okkara áheitan á landsstýrismannin skal tí verða, at hann umhugsar álvarsliga at flyta Maskinmeistaraskúlan niðan aftur undir Krákugjógv til sømiligar umstøður til frama fyri næmingarnar og útbúgvingina.

PS. Maskinmeistarafelagið, sum hevur um 600 limir, heldur tað eisini vera harmiligt og eitt stórt afturstig, at Maskinmeistaraskúlin er fluttur, og at umstøðurnar hjá næmingunum eru munandi versnaðar.

# Hann eigur 1. plássið, Bárður Nielsen

RANDI Í
JÓGVANSTOVU
Leirvík



Tað er so einki at taka feil av.

Nógvar hava umberingarnar verið, fyri ikki at geva okkum í Leirvík eina sømiliga loysn á vegaføringini í Leirvík. Men tann hjá Bárði ber prísin.

Hann sigur, at: Fáa leirvíkingar veg við lokrennu á sløttum, sum í minsta lagi verður tvífalt so dýrur, sum ein vegur oman fyri bygdina, kunnu vit vænta, at trýstið aðrastaðni fer at veksa. (Smbr. Sosialinum 20. februar). Síðani vísir hann til, at veganetið nógva aðrastaðni í landinum als ikki er útbygt til nógvu ferðsluna og ber fram, at vandi er fyri, at aðrar kommunur fara at seta somu krøv.

Sostatt er niðurstøðan hjá Bárði Nielsen: Tað ber ikki til at fíggja eina loysn í Leirvík, sum er góð, tí so fara onnur eisini at biðja um skilagóðar loysnir.

Tí er tað í lagi at brúka eina vánaliga loysn í Leirvík, tí tað finnast so nógvar aðrar vánaligar loysnir í landinum. Hann forbarmi seg.

Sammetingargrundarlagið skal vera so vánaligt sum gjørligt, heldur enn so gott sum gjørligt. Ei undur í at vit ikki koma longur í hesum landinum, men standa og tøva í sama stað.

Illur???

Sig tína meining í Sosialinum




# Asocialt, umoralsk og samfundsnassende pengeafpresning??

## Kommentar til artikel i Sosialurin den 23.02.2006

PETER
ØSTERGÅRD

**Hvem har behov for en veterinær vagtordning?**

Allerførst – det er Færøerne, der som fødevareproducerende nation har behov for en veterinær vagtordning. Dels for altid at have en beslutningstager i det offentlige veterinærvæsen tilgængelig, og dels fordi det ligger implicit i de aftaler landet har gjort med EU.

En veterinær vagtordning er ikke noget, jeg som arbejdstager har et behov for at indgå i, eller som jeg personligt stiller krav om at være en del af.

At arbejdstagere ikke uden videre giver afkald på deres fritid og et normalt familieliv for at deltage i en vagtordning, burde ikke være vanskeligt at forstå.

Udtalelserne om, at jeg forsøger at udnytte situationen er at skyde forbi. Hvorvidt færøske politikere er i stand til at forstå dette, har i alle fald ikke noget at gøre med hverken min moral, eller om jeg er social eller asocial. Det er nok snarere et spørgsmål om viljen til hos de pågældende at sætte sig ind i og forstå problemstillingen vedrørende veterinært beredskab.

**Fugleinfluenza ikke brugt som “våben” i vagtsagen**

I fem år har jeg ihærdigt påpeget det uheldige i, at der ikke findes noget offentligt veterinært beredskab. Aktuelle problemstillinger vedrørende ILA og fugleinfluenza illustrerer meget tydeligt behovet for en veterinær vagtordning.

Det sagen reelt drejer sig om er, at mangelen på et beredskab er brud på den færøske lovgivning. Dyresygdomslovgivningen forudsætter, med sine klare præciseringer om øjeblikkelig meldepligt til det offentlige veterinærvæsen ved mistanke om alvorlige sygdomme, at et offentligt veterinært beredskab findes.

**Tilsidesættelse af indgåede aftaler med EU**

Der hvor problemet bliver helt alvorligt er, at man fra færøsk side ikke fuldt ud respekterer veterinæraftalen mellem EU og Færøerne. Blandt andet er tilstedeværelsen af et veterinært beredskab på Færøerne, en af forudsætningerne for, at EU gav tilladelse til den iværksatte vaccination mod ILA. Samtidig kræves det, at den færøske dyresygdomslovgivning følger EU reglerne – det gør teksten rigtignok, men praksis derimod ikke.

**Forpligtende beredskab**

Et beredskab må nødvendigvis indeholde en formel aftale mellem arbejdsgiver og arbejdstager. Kun herved kan man sikre sig, at der altid er personel til rådighed, også uden for normal arbejdstid. Det er indlysende, at en vagt medfører en begrænsning i den personlige frihed. Lige så klart er det, at et sådant indgreb i en arbejdstagers fritid kun kan foretages, hvis det samtidig medfører en forpligtelse om kompensation fra arbejdsgiveren.

Findes en sådan aftale derimod ikke – og det gør den fortsat ikke i 2006 – kan man hverken forlange, forvente eller være sikker på, at der findes en veterinær tilgængelig den dag, der uden for normal arbejdstid virkelig er brug for det. Uden en vagtordning er der i alle fald ingen, der kan forhindre en dyrlæge i at tage på ferie på Mykines eller på weekendbesøg i Danmark. Ej heller er det muligt koordinere, at landets dyrlæger ikke på én og samme tid er utilgængelige efter arbejdstid!

Opstår en krisesituation da, kan mere eller mindre fromme udtalelser om, at man som dyrlæge bør kunne give et nap med når det gælder, ikke rigtig bruges til noget særligt. Det hjælper så lidt at ville når man ikke kan!